November 1990 dagur	SOLIN upp	i suðri	niður	Longd á degnum	Munur vetur	summar
27 Tys Tórshavn	9.13	12.15	15.15	6.02	+ 1.01	+13.35
28 Mik	9.16	12.15	15.14	5.58	+ 0.57	+13.39
27 Tys Mykines	9.18	12.18	15.18	6.00	+ 1.02	+13.39
28 Mik	9.20	12.19	15.16	5.56	+ 0.57	+13.43
27 Tys Sumba	9.07	12.14	15.21	6.14	+ 0.58	+13.06
28 Mik	9.10	12.15	15.19	6.09	+ 0.54	+13.10
27 Tys Viðareiði	9.16	12.14	15.11	5.55	+ 1.03	+13.53
28 Mik	9.18	12.14	15.09	5.51	+ 0.59	+13.57

Dimmalætting

NR. 137 TÝSDAGUR 27. NOVEMBER 1990.

November 1990 dagur	MÁNIN upp	i suðri	niður
27 Tys Tórshavn	13.28	20.07	1.36
28 Mik	13.28	20.56	3.13
27 Tys Mykines	13.31	20.10	1.40
28 Mik	13.31	21.00	3.17
27 Tys Sumba	13.28	20.06	1.35
28 Mik	13.29	20.56	3.11
27 Tys Viðareiði	13.26	20.06	1.35
28 Mik	13.26	20.55	3.13

Olja einans 10 km. frá føroyska markinum:

– Drálið ikki!

– Farið beinanvegin í holt við neyðugu fyrireikingarnar, sigur Daniel S. Poulsen (sonur føroyska umboðsmannin í Aberdeen, Sofus Poulsen), sum er serkønur innan bretsku oljuvinnuna.

Daniel S. Poulsen (millum kenningar nevndur Danny) visir á, at Hetland hevur stóran og umfatandi oljuidnað beint uttan fyri dyrnar.

– Hvat hava teir fingið burturúr? spyr hann. Og sjálvur svarar hann: Teir hava fingið sera lítið burturút. Tað einasta, ið gevur eitt sindur av sær, er umskipanin í Sullom Voe.

– Hetlendingar fingu lítið burturúr í mun til tikast teirra í oljuidnaðin, ta hann av alvara tók seg upp fyri um leið 20 árum síðan. Men kortini halda teir ikki, at teir kundu verið oljuna fyri utan nú fiskiidnaðurin er minkandi.

Tá hugsað verður um menningina í Vesturhetlandi í dag, er veruleikin tann, at bretskur politikkur er at snúgva seg uttan um Hetland og at stjórna øllum tiltøkum á fastlandinum.

– Eftir 20 ár eiga hetlendingar einki kanningar – ella útgerðarskip – sjálvir, fyri ikki at tala um oljuboripall; ikki heldur er nakar tilkur útbunaður skrásettur har.

Hvat hava føroyingar at læra?

Eitt oyggjarað fyrisitur Hetland. Vit hava løgting. Avgerðarrættur okkara er meira umfatandi enn tann hjá hetlendingum.

– Løgtingið skuldi fingið rættindini til undirgrundina uppá plass, skjótast tilber, sigur Daniel S. Poulsen og visir á, at seinastu 6 árini hevur danska stjórnin gjøgnum DGU gjørt geofysiska kortlegging av føroysku undirgrundini.

– Hann heldur hetta vera ein kerkomnan og hentan bita hjá teimum stóru alheims oljuteløgunum, tá økið verður latið leyst (politiskt) til »Frontier Exploration«.

Tað, føroyingar í mong ár hava dreymt um, er longu veruleiki nú: **Olja fleyt úr eini keldu í øki 205 einans 10 km frá føroyskum sjóøki!**

Daniel S. Poulsen sigur, at frá apríl til november komandi ár verða boraðir fyra hol á nevnda øki. Harumframt eru longu tryð hol borað á øki 206.

Hvat eiga vit at gera?

Daniel S. Poulsen sigur, at enn er ikki av seint hjá føroyingum at sleppa sær uppí oljuidnaðin. Tvørturímóti. Støða okkara hevur onga tíð verið betri enn júst nú – orsakað av seinastu hendingunum.

– Verandi støða í Persiaflógvanum, økti oljuprisurin saman við seinastu oljufundunum vestan fyri Hetland, hava lyft Føroyar upp á tað støði, har vit eru kappingarfør viðvíkjandi kanningarøki, sæð við eygunum hjá stóru alheims oljuteløgunum, so sum eisini støðan var í sjeytiárunum, sigur hann.

– Tey, ið kanska hava sæð tann einsamalla oljuboripallin við føroyska markið ta siglt varð til Scrabsters í summar, undraðust helst á teir triggjar/fýra boripallarnar, so nær føroyska sjómarkinum. Allir skulu teir bora komandi ár.

– Neyðugt verður nú at leggja framtíðarætlanir, um hvussu farast skal fram innan føroyska oljuvinnu. Tá spurningurin um undirgrundina er loystur, kunnu vit ætaka okkum fullan leikklut, tá kanningararbeiðið um oljuna byrjar, sigur Daniel S. Poulsen.

– Føroyingar kunnu ikki standa sum gapandi áskoðarar meðan aðrir leika fyri fullum húsi – á føroyskum palli, heldur hann.

Hvussu eftirfarandi er hetta?

Síðan 1976 hevur Daniel S. Poulsen starvast sum serfrøðingur innan olju- og gasskanningar kring allan knøttin.

Hann sigur seg ikki fáast við politikk og er ikki limur í nøkrum flokki, men fer tó at venda sær til politikararnar og leiða hug teirra og ríðugvaranna at undirgrundarspurninginum og tí týðningi, hann hevur fyri hvønn einstakan.

– Vit vita øll, hvussu støðan í Føroyum er í løtuni og vit mugu ti gera neyðugu fyrireikingarnar, sigur hann.

Íslendska stjórnin:

Meiri skatt á størri inntøkur

Skal nýtast sum tilskot til tey lágløntu

REYKJAVÍK (Sverrir Þórðarson)

Innan vinstrahallu ríkisstjórn Steingríms Hermannssonar tykist vera vaksandi áhugi fyri øktum skatti. Ólafur Ragnar Grímsson fíggjarmálaráðharri hevur gjørt kunnugt, at hann skjótt fer at leggja fram uppskot í Altinginum, har høgar inntøkur skulu skattast við 8 prosentum eyka. Inntøkumarkið hjá fíggjarmálaráðharranum er 300.000 ísl. kr. um mánaðin. Her í landinum er samtíðarskattaskipan galdandi.

Sambært uppskot fíggjarmálaráðharrans fer henda lógin at merkja, at skattgjaldarar við 300.000 kr. í mánaðarlønn (31.800 før. kr.) skulu samtíðargjalda 48% áðrenn persónsfrádrátt.

Fíggjarmálaráðharrin sigur, at peningurin, sum her kemur inn í ríkiskassan, skal gjaldast teimum við lágum inntøkum sum húsaleigutilskot.

Ólafur Ragnar Grímsson fíggjarmálaráðharri, sum umboðar vinstrahallu Fólkasamgonguna Alþýðubandalagið, hevur eisini ætlanir um at broyta lógina um barnastudning til familjur. Ríkið skal ikki gjalda studning til familjur við høgum inntøkum. Hetta skal gera tað møguligt at økja studningin til tey við tem lagu lønunum.

– Og fíggjarmálaráðharrin hevur eisini lagt fram uppskot frá eini »skattanevnd«, sum hann setti. Uppskotið snýr seg um broyting í skattingini av vinnuvirkjum í landinum. Framsøgumenn fyri vinnulívið siga, at um hetta uppskot hjá fíggjarmálaráðharranum verður samtykt í Altinginum, fer skattabyrða vinnulívsins at økjast, og henda øking kann koma upp í milliardir ísl. kr.

Olafur Ragnar Grimsson

– Hertil varð almannakunngjørt, at miðal inntøkur her í Íslandi nú í heyst eru uml. 86.000 ísl. kr. um mánaðin – góðar 9000 føroyskar kr. ▲

Samskiftistól fyri 200 mió. kr. fórust

Tá eldur kom í á posthúsinum í Reykjavík

REYKJAVÍK (Sverrir Þórðarson)

Leygarmorgunin kom eldur í á ovastu hædd í post- og telegrafbygninginum í miðbýnum í Reykjavík. Á hesi hæddini vóru samskiftistólini til telefonsambandið við flestu europeisku londini, og hetta sambandið varð slitið.

Men av tí at tað eydnaðist sløkkiliðnum at basa eldinum eftir tveimum tímum, og umvælingararbeiðið beinan vegin fór í gongd, var Ísland komið í samband aftur við umheimin longu leygardag seinnapart. Tá var fyribils umvælingin liðug.

– Stjórin fyri post- og telegrafverkið Olafur Tómasson sigur, at tað verður neyðugt at skifta út øll telesamskiftistól við tilhoyrandi teldum. Skaðin kemur at kosta post- og telegrafverkinum ið hvussu er 200 mio. ísl. kr. – góðar 20 mió. før. kr.

– Orsøkina til hetta óhappið vita teir einki um enn. ▲

Óvanligur dómur

Nekt mett í framsýningarføri sum list

REYKJAVÍK (Sverrir Þórðarson)

Kriminaldómstólurin í Reykjavík hevur dømt í einum heldur sjáldsomum máli: Í summar varð ein maður handtikin í eini park í miðbýnum í Reykjavík. Hann stóð har spilnakin. Løgreglan meinti, at atferð hansara var ósømilig. Men tað meinti dómarin ikki.

Eftir at løgreglan hevði handtikið mannin, varð ákæra reist móti honum. Maðurin gav ta frágreiðing, at tað als ikki var ætlan hansara, at nakar skuldi taka sær tykni av tí. Meiningin við at standa í urtagarðinum hevði beinleiðis tilknýti til ta listastevnu, sum um tað mundið varð hildin í Reykjavík. Hann var har vegna eitt listasavn, sum var við í hátíðarstevnuni.

Í dómsúrskurðinum hjá kriminaldómstólinum verður sagt, at framferð mansins í urtagarðinum var eitt listarligt mál.

– Dómarin, sum er kvinna, frikendi nakna mannin. ▲



Lagt til rettis: Beate L. Jensen

Tíðindi undir Innanoyggja. Fráboðanir um gudstænastur o. a., sum ynskjast undir Innanoyggja-teigin, skulu vera blaðnum skrivliga í hendi í seinasta lagi kl. 10 dagin fyri, blaðið kemur út. Merkið brævhjálvan Tíðindi Innanoyggja, og sendið hann í góðari tíð til Dimmalætting, Box 19, FR-110 Tórshavn. Í brævinum má týðuliga tilskilast, hvønn dag fráboðanin skal í blaðið.

Gudstænastur 1. sunnudag í advent Sørvágur kl. 12 og kl. 3 barnagudstænasta D. Johannesen; Hvannasund kl. 12 altargangur, Viðareiði kl. 5 altargangur J. Johansen; Fuglafjørður kl. 12 T. Beder; Gøtu kl. 12 altargangur Peter O. K. Olofson; Vestmanna kl. 12 G. Hansen; Hvalvík kl. 12 altargangur M. R. Jacobsen; Eiði kl. 12 altargangur (talvan gongur fyri føroyska sjómanskirkjuna) og kl. 6 ljósmessa, Norðskála kl. 4 ljósmessa E. Olsen; Tjørnuvík altargangur M. Bæk; Øravík kl. 11, Tvøroyri kl. 12 altargangur, Famjin kl. 6 altargangur J. Bech; Havnar kirkja Bj. Bæk.
Sunnudagin gongur talvan í øllum kirkjum í Vága, Norðoya eystara, Eiðis, Suðuroyar norðara og Fuglafjarðar prestagaldi, í Vestmanna kirku og Havnar kirkju til fríma fyri føroyska sjómanskirkjuna.

Nyggja sálmabókin verður tikin í nýtslu sunnudagin í øllum kirkjum í Fuglafjarðar prestagaldi, í Vestmanna kirkju og í Havnar kirkju.

Meinigheitshúsið í Havn. Í kvøld kl. 8 samtalumøti v/ N. J. Nielsen, trúb. Mikukvøldið kl. 8 venur Streingjakórið.

Missiónshúsið við Landavegin. Mikukvøldið kl. 8 møti v/ Hugo Poulsen.

Vargleði møtir í KFUK í dag kl. 4 sp.

KFUK. Lutaseðlarnir eru dreginir (sí lýsing inni í blaðnum í dag).

KFUK-skotar og tittlingar. Mikukvøldið kl. 7 samkoma fyri foreldur og tittlingar. Hóskvøldið kl. 7 samkoma fyri foreldur og skotar.

KFUM. Havn. Dreingjafundur mikudagin kl. 5 til 6.

Frelsunarherurin. Tórshavn. Í dag kl. 5 Juniorgospel; kl. 8 hugnaløta v/ Marit Skarthveit; har øll kunnu vera við. Mikukvøldið kl. 7 venur hornorkestrið. Hóskvøldið kl. 8 Heimaforbundið. Friggjakvøldið kl. 8 ungdómskvøld.

Evangeliihusið. Tróndargøta. Í kvøld kl. 8 bíbliutími og bøn. Hóskvøldið kl. 8 evang. møti, ungfólk leggja fyri. Telefonandaktin tlf. 12266.

Filadelfia. Landavegur 22. Í kvøld kl. 8 venur ungdómskórið.

Aqua Vita. Bøkjarabrekka 9. Bíbliufundur mikukvøldið kl. 8. Telefonandaktin: 11986.

Missiónshúsið í Miðvági. Missiónsvikan byrjar í kvøld kl. 8 v/ D. Johannesen, søknarpresti. Noomi Thomasen syngur. Mikukvøldið kl. 8 talar J. Petersen, trúb.; Streingjakórið í Sørvági syngur.

Bygdahúsið í Tjørnuvík. Sunnudaguin kl. 5 sp. møti v/ Egil Tottegaard, kórið í Kelduni syngur, øll kunnu vera við.

Meinigheitshúsið á Skala. Missiónsvikan byrjar í kvøld kl. 8 v/ Regin Høgnesen, trúb., og Marius Jacobsen, ungdómsbólkurin Skala – Strendur syngur. Mikukvøldið kl. 8 møti v/ ym. talarum, Lorvíkar streingjakór syngur. Missiónsvikan heldur fram vikuna út.

Bygdahúsið á Strondum. Friggja- og leygarkvøldið kl. 10 opið hús v/ tónleiki og vitnisburði, Vanja & Co. Vitin o. fl. eru við.

Filadelfia, Glyvrar. Mikukvøldið kl. 8 evang. møti v/ Óla Jákup Gárd Hansen.

Thabor, Fuglafjørður. Utsøla v/ eydnuhjóli verður í skúlanum friggjakvøldið kl. 7 (sí lýsing inni í blaðnum).

Soli Deo Gloria, Í kvøld kl. 6 barnamøti; kl. 8 ungdómsmøti. Mikukvøldið kl. 9.30 fundur í Matstovuni v/ Mads Dahl, o. fl.

Betania, Skopun. Í dag kl. 5 Sólstrála; kl. 8 bíbliutími og bøn. Hósdagin kl. 4 guitarspæl fyri dreingir.

Húsavík. Missiónsvikan byrjar hóskvøldið kl. 8 v/ N. J. Nielsen, trúb., Skopunar Streingjakór syngur.

Sion, Sand. Mikudagin kl. 3.30 venur Barnakórið, kl. 4.30 Sólstrála, kl. 8 evang. møti.

Missiónshúsið í Porkeri. Barnamøti í dag kl. 5, møti kl. 8 v/ Jóhs. Mortensen, trúb.

Missiónshúsið í Vagi. Barnamøti í morgin kl. 5 sp., møti kl. 8 v/ B. Johannsen, presti.

Dagsglæman, Vágur, møtir í Meinigheitshúsinum í dag kl. 3.30.

Nardus telefonandaktin: 21360.

Frelsunarherurin, Vágur. Mikukvøldið kl. 8 husmøti hjá Karinu Magnussen.

Sion, Vágur. Tyskvøld kl. 9 bønarmøti. Telefonandaktin: 73677.

Kvinnuhusfelagið hevur limafund í KFUM í Havn 1. og 3. hóskvøld í manaðinum kl. 8.

Tórshavnar R. C.-felag hevur modellflogfaravenjing á Velbastaðhálsi mikukvøld og í vikuskiftum vanl. frá kl. 2 sp.

Evangeliska Røddin í Odense. Før sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 4.45 danska tíð á FM 103-5 MHz.

Eyðkvæmislinjan (AIDS) svarar alt samdøgrið á tlf. 18820. Persónlig viðtala millum kl. 4 sp. og 6 týsdag.

Javni, Landsfelag Evnaveikum at Bata, N. Finsensgøta 32. Skrivstovan er opin mána- miku- og friggjadag frá kl. 2 sp. til 4 og hósdag frá kl. 2 sp til 6. Tlf. 14827.

Kvinnuhusið, Kreppumiðstøðin. Telefontíð frá kl. 5 sp. til kl. 7 á morgni á tlf. 17200.

Føroya Giktafelag, Fuglafjørður. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 2 til 4, tlf. 44803 og tlf. 41397.

Pensionistafelagið í Havn hevur hugnakvøld á Parnassinum mikukvøldið kl. 7. Takið Føroya Fólks Sangbók við.

Skála Husmøðrafelag kemur saman mikukvøldið kl. 8 í skúlanum.

Vestmanna Pensionistafelag kemur saman í skúlanum mikukvøldið kl. 7.30.

85 ár. Mikudagin verður Sofía Niclasen, Varðagøta 38, 85 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá dóttrini, Mammulag 7.

V 4 spælið. Leygarkvøldið vórðu hesi tøl drigin í V 4 spælinum hjá Útvarpinum: 80, 9, 50, 44, 97, 28, 89, 38, 54, 59, 30, 72, 1, 94, 18 og 52. Vinningurin var kr. 20.585,-, men eingin vinnarin.

FERD'NAND — **Et tarveligt vindpust..**